

*Hetta er tað fólk minnast sum mjólkarforsýningin í Tórsgøtu. Hesi hús eru bygd í 1922*



*Peter Jensen var fyrsti stjóri*

ferðafólki í Noregi, tí sama ár varð hann seldur til Føroyar.

Tann 11. juni 1908 kom Ruth til Havnar úr Stavanger, og frá 1. august 1908 byrjaði hon sum fyrsta skip at sigla í fastari ferðaætlan norður í Sundalagið, til Hvalvíkar og Oyrar, og inn á Skálafjørðin.

Hvussu stór kollvelting hetta var, kundi FF-blaðið í 2003 greiða frá í samrøðu við Onnu Askham, sum var fødd í 1901 og mintist tíðina áðrenn Ruth. Hon plagdi at fara til Kollafjarðar at vitja mammubeiggja sín. Men tá mátti hon passa sær løgir at sleppa við árabáti, sum kortini fór til Kollafjarðar. Hon mintist framvegis tá ilt á, hvussu rullut tað var at fara framvið Hoyvíkshólm!

Millum manna varð Ruth bert kallaður "mjólkarbáturin". Hann var mastraleysur, málaður hvítur við reyðum skorsteini. Hann hevði 40 hk dampmaskinu, og meistarin fýrdi sjálvur. Hetti skapti so eisini møguleika fyri regluligum postflutningi, sum tó í fyrsta umfari bert var tvær ferðir um vikuna til hvørja bygd. Hetta var tá eitt stórt framstig.

Leingi vóru Jógvan hjá Mikkjali í Dali skipari, og Dánjal í Horni var meistari. Ruth kundi ikki leggja at í Vágsbotni, men har varð stoyptur ein stabbi nakað úti, sum plankar vóru lagdir út á og bátar og smærri før kundi leggja at. Her legði Ruth viðhvørt at, men oftast mátti fergast. Fastur fergumaður um ta tíðina var Poul Johannes hjá Pálli, sum búði í Tróndargøtu.

## Sambandspolitikkur?

Hetta stóra tiltak førdi eisini til ymisk kjak. Eitt, sum ivi varð settur um, var sjálvt navnið Ruth. Tingakrossur bar víðari eitt uppskot um, at "*give den populære Mælkebaad et bedre og mere karakteristisk Navn end det intetsigende og grimme Ruth. Man foreslaar, med henblik paa Tjaldur og Smiril, at kalde den ny Kystbaad Drunnhvíti, hvad slet ikke ville være ueffent. Drunnhvíti er jo en nydelig lille Svømmefugl.*"

Sum við so nógvum øðrum, so kom ikki sørt av politikki í hetta mál. Í februar 1908 hevði Tingakrossur eina grein, har teir harðliga finnast at Dimmalæting fyri at nýta málið til fyrimuns fyri sambandssjónarmið. Tað, at staturin og postverkið góvu stuðul og lán, varð nýtt sum dømi um fyrimunin við sambandi millum Føroyar og Danmark.

Men greinskrivarin í Tingakrossi fýltist eisini á, at tað ikki varð gjørt meira fyri at fáa føroyskan partapening, so sleppast kundi undan at verða heftur á hendan hátt at Danmark. Hann fýltist eisini á, at flutningur av mjólk og posti varð tvinnað saman á hendan hátt. Tí, kom at standa á, so varð tað altíð postflutningur, sum fekk fyrstarætt, meðan mjólkin verður við sviðið soð. Hesir spádómar komu tó ikki at ganga út.

## Máttu fergast umborð

Ein stuttlig lýsing av atløguviðurskiftunum fæst við at lesa stubba í Dimmalætting 19/9 1908. Her verður m.a. sagt:

"*I begyndelsen lagde nemlig Baaden ved sin Ankomst til Land ved et af Byens Broanlæg. Nu ser det ud til, at den har ophørt hermed, hvilket er meget uheldigt baade for Passagerer og Forsendelser. Man maa nemlig betale Færgepenge, som fordyrer Fragten og Passagerernes Billet betydeligt.*

*Den tidligere Postbaad lagde til Land ved sin Afgang herfra og Ankomst hertil, saa man sparede Færgepengene, og Passagertaksten var kun det halve af den nuværende.*"

Síðan verður skoytt uppí, at tá báturin fær statsstuðul, skuldi ein kunnað væntað, at leiðslan í felagnum vil fáa hesi viðurskifti í rættlag.

## "Gribbar" millum fergumenn

Annars lýsir mjólkaforsýningin seinni við, at teir hava gjørt avtalu við Poul Johannes Poulsen um, at hann skal frakta ferðafólk frá og til Ruth fyri 15 oyru fyri hvørt ferðafólk. Møtast kundi ein tíma undan fráferð.

Tað eru fleiri greinir skrivaðar um fergumenn í Havn. Her skal bert nevnast eitt lesarabræv í Tingakrossi í apríl 1908, har tað verður klagað um, at kappingin um ferðafólkini var so hørð, at eina ferð varð eitt ferðafólk skumpað á sjógv av sjálvum fergumanninum í kappingini um at fáa ferðafólk. Teir hava eisini verið "gribbar" tá. Slíkt óskil kundi ikki góðtakast.

## Ferðaætlan og prísir

Ferðaseðlaprísirnir lógu frá 50 oyrum til 1 kr. Hetta var t.d. prísurin av Oyri til Havnar. Av Havn inn á Toftir ella Strendur var prísurin 50 oyru, men longur inn á Skálafjørðin var prísurin 75 oyru. Børn sluppu fyri hálvan prís.

Sjálv ferðaætlanin er eisini áhugaverd. Tað eru tvær høvuðsrutur. Onnur inn á Skálafjørðin, og hin var norður í Sundalagið. Tað varð nøkulunda soleiðis skipað fyri, at tað annan hvønn dag skuldi vera lagaligast at ferðast millum hesi øki. Tað lá t.d. væl fyri at fara úr Kollafirði mánadag og at fara aftur til Havnar týsdag. Tað sæst eisini, at tað hevur verið lagaligt at ferðast úr Kaldbak til Havnar hvønn dag í vikuni. Men at fara úr Havn til Kaldbaks man hava tikið meginpartin av degnum, tí fyrst skuldi farast til øll hini plássini. Her man tað hava verið mjólkaflutningurin, sum taldi.

Ferðaætlanin var sera vegleiðandi, tá siglast skuldi bygd av bygd. Tað man ofta hav verið leingi at bíða hjá ferðafólkunum.

Jørgen hjá Poul Hansen greiddi einaferð frá eini stuttligari søgu um, hvat ið kundi bera til tá í tíðini. Mamma hansara plagdi at hava vitjan av Almu Rustin, sum hevði postin í Fuglafirði. Tær høvdu nógv at práta um og kundu ikki altíð gera seg lidnar, til mjólkarbáturin skuldi fara. Tá varð Jørgen sendur oman í Vágsbotn við boðum um at biðja teir bíða eftir Almu!

## Sigmundur og Streymur

Í 1923 keypti felagið motorbátin Sigmund frá Handilsforeiningini, sum vist helt uppat um hetta mundið. Sigmundur var bygdur á Skála, og tað fyrsta árið sigldi hann til Skálavíkar og Húsavíkar, hagani nógv mjólk var at fáa. Árið eftir fór hann eisini at sigla til Miðvágs. Við Sigmundi plagdu at vera Karl á Kák, sum førdi hann, stundum vóru Karl í Fútastovu og Edvard Lindenskov við, og táið Kvívíks Karl yvirtók hann, var hann rættiliga leingi við.

Í 1926 varð Dúgvan, sum Lias í Rættará hevði bygt til Vágsbotnhandilin, keypt. Hon flutti post til Nólsoyar, Skopunar og út í Hest. Seinni varð hon eisini sett inn í siglingina til Víkar, Norðskála og Eiðis. Óli hjá Essa og Jákup hjá Kaldbaks Peturi sigldu nógv við Dúgvuni.

Táið ísvirkið á Tvøroyri fór á heysin, keypti Mjólkarvirkið ísvirkisbátin Streymur. Hann var bygdur til alla sigling og til allan sjógv, so hann var væl egnaður til rutusigling. Frá Streymi, sum sigldi vestureftir til Klaksvíkar, Viðareiðis og Svínoyar, minnast vit Kristjan Martin og Sofus hjá Linu.

## Ikki bert sum at siga tað at fáa mjólk

Hetta við mjólkini var nú ikki bara sum at siga tað. Fólk skuldi jú venjast við at drekka mjólk aftaná fyri ein stóran part at hava drukkið "svart" drekka í óminniligar tíðir. Annað var, at bøndurnir máttu venjast við at fáa neytini at kálva soleiðis, at



*Pakkhúsini í Vágsbotni, bygd í 1928*



*Fyrsti Tróndur var óhoyrt luksus, sum nógv minnast*